# BESTSELLER-gávukortið – almennar treytir fyri korthandhavara í Føroyum

Hesar brúkaratreytir eru galdandi fyri BESTSELLER-gávukortið ("BESTSELLER-kortið").

1. Veitari av BESTSELLER-kortinum er fashioncheque holding B.V., Kruisweg 801-C, 2132 NG Hoofddorp, Holland. Sølan av einum BESTSELLER-korti er frá sølustøðum, har BESTSELLER-kortið er keypt i navni veitarans.

2. Eitt BESTSELLER-kort er galdandi í trý ár eftir keypið. Eftir tað gongur kreditturin út.

3. Handhavari av einum BESTSELLER-korti kann umbiðja at fáa útgoldið restvirðið av gávukortinum í upp til eitt ár eftir at gávukortið er gingið út. Handhavarin skal í hesum sambandi seta seg í samband við BESTSELLER á BSgiftcard@BESTSELLER.com.
   Handhavarin kann verða kravdur eitt avgjald uppá í mesta lagi FOK 50 í samband við útgjald áðrenn BESTSELLER-kortið er gingið út. Útgjald er ókeypis í eitt ár eftir at BESTSELLER-kortið er gingið út.

4. BESTSELLER-kortið er ikki persónligt og kann soleiðis avhendast øðrum.

5. BESTSELLER-kortið kann ikki áfyllast við kreditti.

6. BESTSELLER-kortið er galdandi í øllum luttakandi sølustøðum í Føroyum[1]

7. BESTSELLER-kortið má bert nýtast til at keypa hesar vørur: klæði, her íroknað skógvar og tilhoyr sum t.d. taskur, smykkur, vakurleikarøkt og luktilsi.

8. Veitarin átekur sær onga ábyrgd av missi, stuldri, skaða, ólesandi ella ólógligari nýtslu av BESTSELLER-korti, i tað mát, at tað ikki er ábyrgd veitarans. BESTSELLER-kortið kann ikki sperrast.

9. Minsta upphædd á einum BESTSELLER-korti er 50 krónur, mesta upphædd er 1.000 krónur.

10. Veitarin setur upphæddina, ið er áljóðandi á BESTSELLER-kortinum í gildistíðini, inn á eina ella fleiri umsitingarkonti í einum ella fleiri týskum bankum. Hesar umsitingarkonti eru í navni veitarans sum opnar felags umsitingarkonti. Veitarin ávísir hesum bankum, sum hava opnu umsitingarkonti, til álitisviðurskifti. Veitarin hevur ábyrgd av, at tær upphæddir, sum standa á umsitingarkonti, til einhvørja tíð roknskapiliga kunnu flytast til relevanta kredior, og at tær í ongum førum verða blandaðar saman við aðrar upphæddir, sum hoyra til annan fysiskan ella juridiskan persón enn veitarans kreditor. Veitarin kann taka út upphæddir frá umsitingarkonto svarandi til tey krøv veitarin hevur fyri avvarðandi kreditor.
    Veitarin skal eftir áheitan upplýsa avvarðandi kreditor um bankan og umsitingarkonti, sum upphæddirnar setast inn á, og siga frá um bankin, sum upphæddirnar setast inn á, hevur eina skipan til at tryggja krøv frá innsetara og investor.

11. BESTSELLER-kort, ið eru keypt og virkjað í Føroyum, kunnu eisini nýtast í Týsklandi, Frankaríki, Slovakia, Luxembourg, Eysturríki, Italia, Kekkia, Noreg, Svøríki, Finnlandi, Spania, Danmark, Írlandi, Sameinda Kongsríkinum, Estlandi, Turkalandi, Kýpros, Póllandi, Litava og Sveis.

[1] Luttakandi sølustøð kunnu finnast við at nýta Shopfinder á BESTSELLER-vørumerkinum online handlum.